Býráðið

Dagfesting: 29.10.2026 kl. 19:00
Málnr.: 25/00008

Nevndarlimir: Dávur Juul, Ólavur Larsen, Eyðun á Lakjuni, Eivin Breiðaskarð, Sonni á Horni, Jastrid á Dalbø, Ørvar Jacobsen, Kristian Martin Petersen

Varalimir: Leif André Eliasen fyri Jóan Pauli Olsen

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Jóanis Erik Køtlum

Málsyvirlit		
Til afgørelse		
27/26	20/00334-2	Broyting í byggisamtykt - matr. nr. 143ch
28/26	20/00510-33	Broyting av byggisamtykt fyri sethúsaøki á Kambsdali til vinnuøki við serligari flokking.
29/26	22/00054-10	Broyting í byggisamtykt fyri matr. nr. 211r í Fuglafirði
30/26	21/00288-3	Broyting í byggisamtyktini matr. nr. 477a, frá B-øki til E-øki,
31/26	21/00239-2	Broyting í byggisamtyktini fyri útstykkingina "Vesturi á Fløtum" millum Gjógvará og innandalsvegin
32/26	26/00086-4	Borgari søkjir um frávik til byggiloyvi.
33/26	26/00506-3	Yvirtøka av landsvegnum á Hellunum
34/26	26/00500-1	Keyp av lendi til byggilendi
35/26	26/00501-1	Keyp av lendi til byggilendi
36/26	26/00490-1	Uppskot til eykajáttan - oktober 2026

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

37/26	26/00337-1	Tilgongd og karmar fyri 2027

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

Til afgørelse

27/26
20/00334-2 Broyting í byggisamtykt - matr. nr. 143ch

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
4 Tekniska nevnd	13.04.2026	20/26
5 Tekniska nevnd	12.10.2026	49/26
6 Býráðið	29.10.2026	27/26

Tilráðing

Til viðgerðar í	Teknisku nevnd.
Stutt lýsing	Umsitingin hevur fingið umsókn frá eigara av matr. nr. 143ch um byggiloyvi til íbúðarbygning, har ovasta hæddin er ein íbúð, og 1. hædd og 2. hædd hava tvær íbúðir hvør sær. Umsitingin hevur ráðført seg við advokat kommununar og er niðurstøðan tann, at bestu ráðini er at gera eina serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 143ch. Neyðugt er at gera eina frámatrikulering til fimm íbúðareindir, áðrenn verkætlanin verður gjøgnumført. Hendan byggiverkætlan frígevur 5 bústaðareindir og sølu av einum sethúsum, sum hevur tvær íbúðareindir. Treytirnar í byggisamtyktini og BK17 skulu uppfyllast. **Ískoyti** Umsitingin hevur havt fund við løgfrøðing kommununar um tilgongdina at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 143ch, Fuglafjørður, sí tilmæli frá fundinum millum umboð frá Sókn og umboð kommununar. Mælt verður til at gera eina serstaka byggisamtykt fyri matrikulin, har broytingarnar eru gjørdar soleiðis, at tær samsvara við karaktering í økinum. Víst verður til FK j. nr. 20/00334-5. Umsitingin hevur gjørt eitt uppskot til broyting í byggisamtyktini saman við einum korti fyri matr. nr. 143ch, Fuglafjørð. Víst verður til uppskot um broytan av byggisamtyktini fyri matr. nr. 143ch, Fuglafjørðurm, sí FK j. nr. 20/00334-6. **Ískoyi 17. september 2020** Umsóknin hevur verið viðgjørd fyrstu ferð tann 2. juli í ár. Síðani hevur tekniska deild viðgjørt málið í samráði við løgfrøðing kommununar, og eitt endaligt uppskot er gjørt um broyting í byggsamtykt galdandi fyri

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ Í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

	matr. nr. 143ch, Fuglafjørður. Teknska nevnd viðgjørdi málið seinnu ferð tann 10. september, og tók undir við uppskotinum til broyttu byggisamtyktina. Víst veðrur til uppskot til serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 143ch, Fuglafjørður við tilhoyrandi korti til serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 143ch, Fuglafjørður, sí FK j. nr. 20/00334-8. Umsitingin hevur hoyrt grannan, sum er eigari av matr. nr. 143ci, um uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri økið. Umsitingin hevur sent endaliga uppskotið til hoyringar hjá umsøkjara. Svar er komið aftur við eini góðkenning. Endaliga uppskotið er klárt at senda til almenna hoyring og til Føroya Landstýri. **Ískoyti til fund í teknisku nevnd 9. mars 2026** Uppskoti til broytingar í byggisamtyktini vórðu lýst og lógu frammi 6. oktober 202 til 17. november 2020. Tá freistin varð farin varð eingin viðmerking komin til broytingina. Av misgávum er málið dottið niður ímillum í umsitingini og er tí ikki sent til landsstýrið. **Ískoyti til fund í teknisku nevnd 12. oktober 2026** Umsókn um byggiloyvi til íbúðir varð send kommununi 27. august í 2020. Í samráð við sakførara, var niðurstøðan at bestu ráðini var at gera serstaka byggisamtykt, nú serliga økisáseting fyri matr. nr. 143ch. Málið varð í fyrstan tíð samtykt av býráðnum 24. september 2020. Serstøk byggisamtykt varð løgd fram og samtykt. Síðan varð einki gjørt við málið. Hóast skjølini eru tey somu, verður málið viðgjørt av nýggjum, tí rúm tíð er farin. Tekniska nevnd fær málið til viðgerðar enn einaferð, og verður tað beint víðari til býráðið at viðgera, áðrenn tað aftur verður lagt út til hoyringar, um samtykt. Stutt um málið: Bygningurin fevnir um ovastu hædd, har 1 íbúð er, og 1. hædd og 2. hædd hava tvær íbúðir hvør sær. Umsitingin ráðførdi seg við advokat kommununar og varð niðurstøðan tann, at bestu ráðini er at gera eina serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 143ch, treytað av at ein frámatrikulering til fimm íbúðareindir varð gjørd, áðrenn verkætlanin verður gjøgnumførd. Treytirnar í byggisamtyktini og BK17 skulu uppfyllast. Víst verður til uppskot til serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 143ch.
Bakgrund	Gagnnýta byggiøkir hjá Fuglafjarðar kommunu betri.

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

<table>
<tr><td>Grundarlag</td><td colspan="3">• Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt
Byggisamtyktin , BK17 og uppskot til serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 143ch, Fuglafjørður
• Møgulig fylgiskjøl
FK j. nr. 20/00334-1 Umsókn um byggiloyvi til íbúðarbygging
FK j. nr. 20/00334-5 Tilmæli frá løgfrøðingi kommununar
FK j. nr. 20/00334-6 Uppskot til broytingar í byggisamtyktini fyri matr. nr. 143ch, Fuglafjørður
FK j. nr. 20/00334-8 Uppskot til serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 143ch, Fuglafjørður_19. september 2020
FK j. nr. 20/00334-8 Kortskjal til serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 143ch, Fuglafjørður_19. september 2020</td></tr>
<tr><td colspan="4">Viðgerð</td></tr>
<tr><td rowspan="3">Tekstur íð lýsir loysn</td><td>Avleiðingar</td><td>Stuttíðar</td><td>Langtíðar</td></tr>
<tr><td>Fíggjarligar</td><td>Ja</td><td>Ja</td></tr>
<tr><td>Umsitingarligar</td><td>Ja</td><td>Ja</td></tr>
<tr><td>Tilmæli</td><td colspan="3">Tekniski leiðarin mælir til at gera eina serstaka byggisamtykt fyri hendan matrikulin.
Nýtt tilmæli
Tekniski leiðarin mælir til at taka undir við uppskotinum um broytta byggisamtykt fyri matr. nr. 143ch, Fuglafjørður. Víst verður til FK j. nr. 20/00334-6.
Nýtt tilmæli
Tekniski leiðarin mælir til at taka undir við endaliga uppskotinum til serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 143ch, Fuglafjørður saman við korti til serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 143ch, Fuglafjørður, sí FK j. nr. 20/00334-8.
Tilmæli til fundin 13. apríl 2026
Mælt verður til at málið við tekning av korti og dagførdum teksti verður sent landsstýrinum til góðkenningar.

Tilmæli til fundin 12. oktober 2026
Tekniski leiðarin mælir til at góðkenna serligu økisásetingina fyri matr. nr. 143ch, sum loyvir bygging av íbúðarbygningi við 5 búðeindum, samsvarandi málslýsing og kortskjølum.</td></tr>
<tr><td>Dagf</td><td colspan="3">17. september 2020</td></tr>
</table>

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

Tekniska nevnd 02. juli 2020
Nevndin tekur einmælt undir við tilmælinum.

Tekniska nevnd 10. september 2020
Nevndin tekur einmælt undir við tilmælinum.

Býráðið 24. september 2020
Býráðið tók einmælt (9-0) undir við tilmælinum frá teknisku nevnd, at loyva serstakari byggisamtykt fyri matr.nr. 143ch, Fuglafjørður

Tekniska nevnd 13. apríl 2026:
Tekniska nevnd tekur undir við tilmælinum.

Tekniska nevnd 12. oktober 2026:
Tekniska nevnd tekur ein mælt undir við tilmælinum.

Býráðið 29. oktober 2026:
Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum frá teknisku nevnd.

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

28/26

20/00510-33 Broyting av byggisamtykt fyri sethúsaøki á Kambsdali til vinnuøki við serligari flokking.

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
3 Vinnu- og havnanevndin	12.10.2026	23/26
4 Býráðið	29.10.2026	28/26

Tilráðing

Til viðgerðar í	Vinnu og havnanevndin
Stutt lýsing av málinum	Býráðið samtykti 29. oktober 2020, at broyta byggisamtyktina fyri øki á Kambsdali frá at verða sethúsaøki til lættari vinna. Í samtyktini var orðingin *Lættari vinna nýtt* og sambært Innlendismálaráðnum, kann hetta bert gerast um teksturin í byggisamtyktini samstundis verður broyttur, og nærri lýsir hvat hetta merkir. Hetta var orsøkin til at broytingin sum var samtykt og hevur ligið frammi ikki kundi góðkennast. Fyri at kunna fremja hesa broyting, má ein tekstur leggjast afturat tekstinum í byggisamtyktini fyri økispart C-vinnuøki. **Til fund í Vinnu- og Havnanevndini 12. oktober 2026** Býráðið samtykti 29. oktober 2020, at broyta byggisamtyktina fyri øki á Kambsdali frá at vera sethúsaøki til lættari vinna. 30. mai 2024 var tekstur gjørdur og samtyktur í býráðnum, og í viðgerðini hjá Býarskipanarnevndini í februar 2026, var svarið, at teksturin ikki var nøktandi - í samtyktini var eingin tekstur, ið lýsti, hvat 'lættari vinna' er. Harafturat gjørdu íbúgvar á økinum vart við seg í mun til avleiðingar av vinnuligum virksemi, sum kann vera dálking av ymiskum slag. Málið er tikið upp aftur, og uppskot, at C1 teksturin frá 2024 skal tillagast og umskrivast. Nýggja ásetingin leggur upp til vinnuligt virksemi, treytað av, at tað ikki hevur nakra dálking við sær, hvørki larm-, lukt- ella ljóðdálking. Í svari til mótmæli frá borgarum, hevur kommunan víst á at løtt vinna í hesum sambandi ítøkiliga merkir, at *virksemið ikki hevur larm-, lukt- ella sjónampar við sær.*
Orsøk til at málið verður viðgjørt	Stórur tørvur er á øki til vinnuna á Kambsdali.
Grundarlag	• Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt • Møgulig fylgiskjøl

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

Viðgerð			
Tekstur íð lýsir loysn	Avleiðingar	Stuttíðar	Langtíðar
	Fíggjarligar		
	Umsitingarligar		
Tilmæli	Tekniski leiðarin mælir til at áseting verður sett í sum lýsir hvat *Lættari vinna merkir*. Eysturkommuna hvur eina flokking av virkjum og virksemi í byggisamtyktini, hendan liggur undir Býarætlan og byggisamtykt. Mælt verður til at gerða eitt ískoyti til tekstin fyri øki C-Vinnuøki sum er soljóðandi. ***Lættari vinna*** *Umfatar virkir, ið geva orsøk til minni ávirkan á sítt nærmasta umhvørvi og kann staðsetast í øki, har tað eisini eru bústaðir. Virkir í hesum flokkinum eru serliga minni virkir sum ikki hevur við sær larm, lukt ella sjónampar. Tó kann økið verða nýtt til goymsluøki til virkir har tilfar og útgerð kann liggja uttan at órógva og ávirka umhvørvið. Frástøðan til bústaðir, er fyri henda flokk uml. 20 metur.* *Virksemið skal verða avmarkað til at verða í arbeiðstíð 8-17 og einki virksemi má verða millum 17-8 gerandisdagar.* Á býráðsfundinum skutu býráðslimirnir Magni Jøkladal og Eyðun á Lakjuni til í staðin fyri orðingina í seinasta reglubroti til heldur at vísa til øki 3 í niðanfyristandandi talvu:		

Dagur	Klokkutíð	Tímar	Øki 1 dB(A)	Øki 2 dB(A)	Øki 3 dB(A)	Øki 4 dB(A)
Mánadag til fríggjadag	07-18	8	70	60	55	45
Leygardag	07-14	7	70	60	55	45
Leygardag	14-18	4	70	60	45	40
Sunnu- og halgidagar	07-18	8	70	60	45	40
Allar dagar	18-22	1	70	60	45	40
Allar dagar	22-07	0,5	70	60	40	35
Hámarksvirði	22-07				55	50

Til fundin í Vinnu- og havnanevndini 12.10.2026

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

	Tekniski leiðarin mælir til at merkta B-sethúsaøkið verður broytt til C1 vinnuøki (lættari vinna), sum merkt á kortum, og at ein C1 áseting verður sett í sum lýst er í fylgjiskjali.
Dagf	30.09.2026

Vinnu- og havnanevndin 14. mai 2024:
Vinnu- og havnanevndin fylgir einmælt tilmælinum frá tekniska leiðara. Eisini at øki verður avbyrgt frá sethúsaøkinum.

Býráðið 30. maj 2024:
Býráðið atkvøddi fyrst um broytingaruppskotið frá Eyðun á Lakjuni og Magna Jøkladal. Býráðið tók einmælt undir við uppskotinum og er uppsoktið tí samtykt við hesum broytingum.

Vinnu- og havnanevndin 12. oktober 2026:
Jóan Pauli og Kristian Martin tóku undir við tilmælinum, at skipa øki til C1 økið har sethúsaøkið og vinnuøkið vera avbyrgt við min. 25m frástøðu.
Løtt vinna á C1 kann allýsast sum t.d. verkstaðir, smærri framleiðsla, skrivstovur, handilshølir, tænastavinna, o.a., har maskinur og arbeiðsgondir vanliga geva avmarkað óljóð og ferðslu. Markvirði fyri óljóð leygardag kann tó vera 55dB(A) frá kl 08 - 18.
Ørvar mælir til at frástøðan millum sethúsaøkið og vinnuøkið vera avbyrgt við min. 50m frástøðu. Síðani kann økið fara undir C økið.

Býráðið 29. oktober 2026:
Fyrst varð atkvøtt um uppskotið frá minnilutanum í Vinnu- og havnanevdnini, Ørvar Jacobsen, um frástøðu uppá 50 m. Ólavur Larsen, Jastrid á Dalbø, Ørvar Jacobsen og Sonni á Horni atkvøddu fyri, meðan Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Kristian Martin Petersen, Leif André Eliasen og Eivin Breiðaskarð atkvøddu ímóti. Uppskotið fall sostatt.

Síðan varð atkvøtt um uppskotið frá meirilutanum í Vinnu og Havnanevndini. Ólavur Larsen, Jastrid á Dalbø, Ørvar Jacobsen og Sonni á Horni atkvøddu ímóti, meðan Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Kristian Martin Petersen, Leif André Eliasen og Eivin Breiðaskarð atkvøddu fyri. Uppskotið varð sostatt samtykt.

29/26
22/00054-10 Broyting í byggisamtykt fyri matr. nr. 211r í Fuglafirði

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
3 Tekniska nevnd	13.04.2026	21/26
4 Tekniska nevnd	12.10.2026	50/26
5 Býráðið	29.10.2026	29/26

Tilráðing

Til viðgerðar í	Teknisku nevnd.
Stutt lýsing av málinum	Sp/f Svalir hevur latið umsókn inn til umsitingina um keyp av grundøki, matr. nr. 211r, Fuglafjørður. Eisini verður spurgt um møguleikar fyri býstaðarbygging og íbúðarbygging í Fuglafjarðar kommunu. Umsitingin hevur havt ein innleiðandi fund við Svalir, har fleiri møguleikar vóru umrøddir um at byggja seks íbúðareindir á einum grundøki hjá Fuglafjarðar kommunu. Umsitingin vísti Sp/f Svalir á eitt grundøki, matr. nr. 211r, sum er 611 fermetrar til støddar. Matrikul nr. 211a, umleið 227 fermetrar, er ogn hjá Fuglafjarðar kommunu. Verður hesin matrikul lagdur saman við 211r, so verður grundøkið 838 fermetrar til støddar. Harvið er møguleiki fyri at gera seks íbúðareindir á samlaðu grundstykkjavíddini. Ein búeind fyri hvørjar 75 fermetrar. Byggiprosentið kann verða 0,6. Matr. nr. 211a er hugsaður til at brýka sum perkeringsøki. Eisini er møguleiki fyri at víðka grundøkið oman ímóti vegnum suðureftir. Umsitingin hevur gjørt eina yvirlitstekning við 8 parkeringsplássum. Ætlanin er at grava grundstykkið út og gera tað byggibúgvið. **Ískoyti til býráðsfundin 24. februar 2022** Tekniska samtykti á fundi 17. februar um at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 211r og parti av matr. nr. 211a, umleið 253 fermetrar, og leggja nevndu matriklar saman í eitt matrikulnummar, og víðka matr. nr. 211r oman ímóti vegnum suðureftir við 1,23 m, soleiðis at matr. nr. 211r verður 649 fermetrar til støddar, og broyta byggisamtyktina til eisini at umfata íbúðareindir, sum kunnu matrkulerast frá. Samlaði matrikulin verður tá 902 fermetrar. Eisini samtykti nevndin at leggja málið út til almenna hoyring og eftirlits.

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

	Til fundin í teknisku nevnd 13. apríl 2026 Uppskotið til at broyta byggisamtyktina varð lýst og lá alment frammi frá 17. mars 2022 til 2. mai 2022. Tá freistin var út vóru eingi mótmæli komi. Aftaná at málið lá frammi í 2022 er einki hent. **Ískoyti til fundin í teknisku nevnd 12. oktober 2026** Málið varð í fyrstan tíð samtykt av býráðnum 24. februar 2022. Umsitingin vísti arbeiðstakara á grundøki matr. nr. 211r, sum eftir samanlegging við annan matrikkul nú er 902 fermetrar til støddar, og har 6 íbúðareindir kundu byggjast á. Partur av matr. nr. 211r og partur av g øki skal brúkast sum parkeringsøki. Talan er um eina búðeind fyri hvørjar í minsta lagi 150 fermetrar við einum byggistigi á 0,6. Kort vísa, at talan er um ein norðara og sunnara matrikkul, sum er lagdur saman til ein. Málið hevur ligið frammi til almenna hoyring frá 17. mars til 2. mai 2022. Síðani tá varð einki gjørt við málið. Semja er um at viðgera málið av nýggjum og leggja tað fram til hoyring enn einaferð við endaligt viðgjørdum og krøvdum skjølum.
Orsøk til at málið verður viðgjørt	Fyrispurningur frá Sp/f Svalir um møguleikar fyri bústaðar- og íbúðarbygging í Fuglafjarðar kommunu.
Grundarlag	• **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt** Byggisamtyktin og BK 17 • **Møgulig fylgiskjøl** FK j. nr. 22/00054-9 Plantekningar, skurður og 3D-myndir FK j. nr. 22/00054-12 Yvirlitsteking av matr. nr. 211r og 211a

Viðgerð			
Tekstur íð lýsir loysn	Avleiðingar	Stuttíðar	Langtíðar
	Fíggjarligar	Ja	Ja
	Umsitingarligar	Ja	Ja
Tilmæli	Tekniski leiðarin mælir til at matrikulera matr. nr. 211r og 211a saman í ein matrikul, og at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 211r soleiðis, at tilber at byggja 6 íbúðareindir, og at leggja broyting av byggisamtyktini út til allmenna hoyring og eftirlits. **Nýtt tilmæli til býráðsfundin 24. februar 2022** Tekniski leiðarin mælir til, at býráðið tekur undir við samtyktini í teknisku nevnd 17. februar 2022 um at matrikulera part av matr. nr. 211a saman við matr. nr. 211r, og broyta byggisamtyktina fyri økið til eisini at umfata íbúðarbygging, víðka part av matr nr. 211r oman ímóti almennum vegi, og at leggja broytingina av byggisamtyktini út til almenna hoyring		

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

	og eftirlits. Eisini samtykti nevndin at marknaumskipa part av matr. nr. 211a, umleið 11,5 fermetrar, til litra økið, matr. nr. g, Fuglafjørður, sum er vegaøki. Eisini verður mælt til, at eitt øki, sum svarar til 5 parkeringspáss, umleið 50 fermetrar, verður matrikulera frá matr. nr. 211a til litraøki, matr. nr. g, Fuglafjørður. **Til fundin í teknisku nevnd 13 apríl 2026** Mælt verður til at tekniska nevnd tekur undir við at máli umsitingin fer undir at avgreiða málið um broyting av byggisamtyktini fyri matr. nr. 211r, herundir at gera eina tekstáseting til serstaka byggisamtykt fyri økið. **Tilmæli til fundin í teknisku nevnd 12. oktober 2026** Tekniski leiðarin mælir til at góðkenna broyting frá B sethúsaøki til serligu økisáseting B5 íbúðarbygging fyri norðara og sunnara matrikkul nr. 211r, og at øki sunnanfyri sunnara part av matr. nr. 211r verður til broytt frá at vera B sethúsaøki til g øki, samsvarandi kortskjølum.
Dagf	17. februar 2022.

Tekniska nevnd 17. februar 2022:
Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og leggja part av matr. nr. 211a saman við matr. nr. 211r, og broyta byggisamtyktina fyri samlaða matrikulin, og leggja broytingina út til almenna hoyring og eftirlits. Matr. nr. 211r verður víðkað oman ímóti almennum vegi.
Partur av matr. nr. 211a verður at leggja saman við matr. nr. 211h, fyri at fáa innkoyringina í lagi. Hetta skal gerast í samráð við eigarin av matr. nr. 211h.

Býráðið 24. februar 2022:
Býráðið samtykti einmælt (8-0), at fylgja tilmælinum frá teknisku nevnd, at leggja saman matriklarnar 211a og 211r og broyta byggisamtyktina fyri samlaða matrikkulin, og leggja broytingina út til almenna hoyring og eftirlits. Í hesum sambandi góðkendi býráðið eisini, at partur av matr.nr. 211a verður lagdur saman við matr.nr. 211h í samráði við eigaran av matr.nr. 211h.

Tekniska nevnd 13. apríl 2026:
Tekniska nevnd tekur undir við tilmælinum

Tekniska nevnd 12. oktober 2026:
Tekniska nevnd tekur ein mælt undir við tilmælinum.

Býráðið 29. oktober 2026:
Býráðið tekur einmælt undir við tilmælinum frá teknisku nevnd.

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

30/26
21/00288-3 Broyting í byggisamtyktini matr. nr. 477a, frá B-øki til E-øki,

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
3 Tekniska nevnd	12.10.2026	48/26
4 Býráðið	29.10.2026	30/26

Tilráðing

Til viðgerðar í	Teknisku nevnd.
Stutt lýsing	Í sambandi við skúlabyggingina av 64-skúlanum, er neyðugt at broyta byggisamtyktina fyri skúlaøkið vestanvert, matr. nr. 477a, sum kommunan er eigari av. Neyðugt er eisini, at kommunan ognar sær part av privatari ogn, matr. nr. 530. Víst verður til FK j. nr. 21/00271, og at hesin parturin av matr. nr. 530, Fuglafjarður, verður fevndur av broytanini av byggisamtyktini. Økið, matr. nr. 477a og partur av matr. nr. 530, verður broytt frá sethúsaøki B til Alment øki/skúlaøki E. **Framtíðin hjá Fuglafjarðar skúla** Tá skúlin er liðugt útbygdur, so eru skerdir møguleikar fyri eini útbygging afturat, uttan at hugsa um økið vestureftir. Neyðugt er, at kommunan ger eina heildarætlan fyri økið vestanvert skúlan, og at nevndin gevur umsitingini heimild til at taka upp samráðingar um keyp av lendi og ognum í hesum øki, hetta fyri at tryggja, at skúlin hevur vakstrarmøguleikar í framtíðini. **Til fund í teknisku nevnd 12.10.2026.** Mælt verður til at broyta byggisamtyktina eftir uppskotinum dagf. 30.09.2026. Restina av matrikulinum 477a verður verandi B-øki. Frá uppruna uppslotinum 10.05.2021 eru ognarviðurskiftini fingin í rættlag við eigaran av matr.nr. 530, soleiðis at broytingin í byggisamtyktini er bert fyri matrikul 477a (Kommunan).
Bakgrund	Broyting av byggisamtyktini fyri skúlaøkið í sambandi við útbygging av 64-skúlanum og skúlanum annars.
Grundarlag	• **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt** Byggisamtyktin og BK17 • **Møgulig fylgiskjøl** FK j. nr. 21/00288-1 Broyting í byggisamtyktini FK j. nr. 21/00288-2 Plantekning av broyting í byggisamtyktini

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

Viðgerð			
Tekstur íð lýsir loysn	Avleiðingar	Stuttíðar	Langtíðar
	Fíggjarligar	Ja	Ja
	Umsitingarligar	Ja	Ja
Tilmæli	Tekniski leiðarin mælir til at góðtaka uppskot til broyting í byggisamtyktina fyri matr. nr. 477a		
Dagf	12.10.2026		

Tekniska nevnd 18. maj 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, og at umsitingin fyrireikar málið til viðgerð í býráðnum.

Býráðið 27. maj 2021:
Býráðið samtykti einmælt (9-0), at fylgja tilmælinum frá teknisku umsiting og teknisku nevnd og góðkendi broyting í byggisamtyktini fyri matr.nr. 477a og part av matr.nr. 530, Fuglafjørður.

Tekniska nevnd 12. oktober 2026:
Tekniska nevnd tekur einmælt undir við tilmælinum.

Býráðið 29. oktober 2026:
Býráðið tekur einmælt undir við tilmælinum fra teknisku nevnd.

31/26
21/00239-2 Broyting í byggisamtyktini fyri útstykkingina "Vesturi á Fløtum" millum Gjógvará og innandalsvegin

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
7 Tekniska nevnd	12.10.2026	47/26
8 Býráðið	29.10.2026	31/26

Tilráðing

Til viðgerðar í	Teknisku nevnd.
Stutt lýsing	Umsitingin arbeiðir støðugt við einum bústaðarpolitikki fyri Fuglafjarðar kommunu. Arbeiðið fevnir millum annað um at gera lokalplanir fyri ymisk bústaðarøkir í kommununi. Útstykkingarætlanir skulu vera í trá við bústaðarpolitikkin hjá Fuglafjarðar kommunu. **Útstykkingarplanur vesturi á Horn** Tekniska deild hevur gjørt eitt uppskot til útstykkingarplan á økinum millu Gjógvará og vegin vestur á Horn. Talan er um grundøkir til bústaðarbygging, har pláss er fyri tveimum grundøkjum omanfyri vegin, og 9 grundstykkjum niðanfyri vegin. Fýra av grundøkjunum hava eina serskylda atkomu. Hetta gevur møguleika fyri tveimum grundstykkjarekkjum. Tó er eitt alternativt uppskot gjørt, har 8 grundstykkir eru niðanfyri vegin. Grundøkini eru áleið 400 til 500 m2. **Serstøk byggisamtykt fyri økið og lokalplanur** Neyðugt er at arbeiða við eini serstakari byggisamtykt fyri sama økið. Økið er soleiðis hátta, at innari parturin av útstykkingini er egnað til eittplanshús, meðan tann eystari parturin av økinum er egnaður til sethús í tveimum hæddum. Neyðugt verður eisini at taka atlit til útsýni hjá verandi grannaognum, og at útsýnisviðurskiftini hjá eigarum á nýggju útstykkingini verða so góð sum tilber. Økið liggur tætt uppá Gjógvará, sum er sera náttúruvakurt, og júst hesi viðurskifti seta stór krøv til útstykkingina, bæði tá viðvíkur støddd og hædd av sethúsum, vegaføringum og estetikki. Sum dømi kann nevnast, at markamótið millum grannar og oman ímóti ánni eigur at verða runnavøkstur ístaðin fyri garðar. Tá avgerð er tikin um, hvussu økið skal skipast, verður farið undir at gera lokalplan og serstaka byggisamtykt fyri økið.

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

Framhald 22. apríl 2021
Tekniska nevnd viðgjørdi málið á fundi 15. apríl í ár, har nevndin mælti til at arbeiða víðari við uppskotinum við 10 grundstykkjum og ein lokalplan fyri økið. Til kunning og umrøðu hjá býráðnum

Framhald til fundin í teknisku nevnd 23. august 2021
Umsitingin hevur arbeitt við verkætlanini við atliti til uppskot til broytta byggisamtykt/lokalplan fyri økið. Her verða byggifelt og planeringshøddir tilskilaði.
Ein nágreinulig uppmáting er gjørd av útstykkingarøkinum, soleiðis at tilber at gera tvørskurðir oman ígjøgnum lendi frá vegnum og oman í ánna.
Skitsan við 10 grundstykkjum er gjørd um til eina digitaliseraða plantekning, sum eisini er ein matrikulplanur. Hesin verður sendur til Umhvørvisstovuna til matrikuleringar.

Arbeitt hevur verið við at prosjekera tekniskar leiðingar í lendi, og gera útbjóðingartilfar, soleiðis at arbeiðið er klárt at bjóða út, so skjótt sum tey matrikuleru viðurskiftini eru avgreidd.

Fyrireiking til kloakk í sambandi við útstykkingina
Umsitingin mælir til at bjóða kloakkarbeiðið út frá útstykkingini og oman í eitt felags reinsiverk, og síðani leiða skittvatnskloakkina út í kommunala kloakk á Hornavegi. Á henda hátt verða vit frammanfyri, soleiðis at tá klárt er at fara undir sjálvt útstykkingararbeiðið, so er forarbeiðið við íbindingini til kloakkini avgreitt.
Skittvatnskloakkin frá sethúsunum omanfyri vegin eru ikki í lagi. Hetta verður tikið hond um, tá vegurin framvið nýggju útstykkingini verður dagførdur.

Framhald til fundin í býráðnum 26. August 2021
Teknisk nevnd viðgjørdi málið 23. august 2021 og samtykti matrikulplanin fyri økið millum Gjógvará og vegin vestur á Horn, og eitt minni økið omanfyri sama veg við teirri broyting, at vegaføringin verður 6,0 m vegur og 2,0 m gongubreyt í ovara borð, tvs. at gongubreytin í niðara borð á 2,0 m verður tikin burtur við atliti til sparingar, og at byggjaríðið ikki kemur ov langt oman við atliti til stóran hæddarmun.
Tekniska deild hevur tikið hædd fyri at varðveita økið vestanvert sum fríøki, soleiðis at tilber at gera spælipláss og møguleikar til annað frítíðarvirksemi.
Eisini samtykti tekniska nevnd, at økið omanfyri vegin verður broytt frá at verða tvey grundstykkir til at verða eitt størri grundøkið til raðhús, sum verða bygt eftir lendinum niðurtrappað.
Fyri at skunda undir verkætlanina, so samtykti tekniska nevnd at bjóða kloakkarbeiðið út beinanvegin frá útstykkingini og oman til reinsiverkið

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

	við Hornavegin, soleiðis at tá matrikuleringin og broyting av byggisamtyktini er góðkend, so er klárt at binda kloakkina í. **Tað sum býráðið skal taka støðu til er fylgjandi** 1. Góðkenning av matrikulplanurin 2. Góðkenning av ávegis uppskoti til ásetingar til broytta byggisamtykt/lokalplan 3. At góðkenna kloakkprosjektið, og at bjóða arbeiðið út sum undirhondsboð beinanvegin **Ískoyti til fundin í teknisku nevnd 10. mars 2022** Umsitingin hevur arbeitt við at fingið írestandi lendi til vega í sambandi við útstykkingina vestur Innaldals. Matr. nr. 135a og matr. nr. 88a eru sundurbýtt frá øðrum ognum, og sum nú eita matr. nr. 135d, og matr. nr. 88b. Hesir matriklar verða skeytaðir til Fuglafjarðar kommunu, har umsóknir eru ávegis til Tinglýsingina. Matr. nr. 438 er meira trupult at fáast við, so hesin geirin niðanfyri Innandalsvegin verður ikki marknaumskipaður til kommununa enn. Víst verður til dagførdan matrikulplan fyri økið. Umsitingin hevur í samráð við ARKITEK gjørt dagføringar í uppskotinum til serstaka byggisamtykt, har 8 grundøkir verða niðanfyri Innandalsvegin, og 10 íbúðareindir omanfyri Innandalsvegin, tvs. 18 íbúðareindir ialt. **Víst verður til hesi skjøl frá ARKITEK** 1. Skitsu viðv. víddar- og hæddarásetingum og eitt sethúsadømi út frá hesum 2. Hjáskjal viðv. byggifeltum og hæddarasetingum viðv. serstakari byggisamtykt fyri økið vesturi á Fløtum 3. Serstøk byggisamtykt fyri sethúsaøkið niðanfyri Innandalsvegin, og íbúðarbygging norðanfyri Geilina Eisini er tekniska deild í ferð við at bjóða kloakkeringsarbeiðið út við støði í dagførda uppskotinum til serstaka byggisamtykt fyri økið. **Býráðsfundur 31. mars 2022** Á fundi í Teknisku nevnd tann 17. mars 2022 samtykti nevndin, at taka undir við tilmælinum frá Tekniska leiðaranum, sum mælti til at: 1) góðkenna eitt dagført uppskot til serstaka byggisamtykt 2) góðkenna dagførda matrikulplanin 3) leggja serstøku byggisamtyktina út til hoyringar og alment eftirlit 4) beina málið í býráðið til víðari avgreiðslu

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

	Víst verður til dagførdan matrikulplan, dagfestur 3. mars 2022 sí FK j. nr. 21/00239-21, og visualisering av útstykking vestur Innandals, gjørd av Nýrúm, sí FK j. nr. 21/00239-39. **Fundur í teknisku nevnd 12.10.2026** Býráðið samtykti 31. mars 2022 nýggja byggisamtykt og matrikulplan fyri útstykking vesturi á fløtum, niðanfyri Innandalsveg og norðanfyri geilina. Matrikulplanurin er gjøgnumførdur men byggisamtyktin er ikki komin viðari.
Bakgrund	Bústaðurpolitikkur hjá Fuglafjarðar kommunu og ynski um at gera fleiri útstykkingar til fjølbroytta bústaðarbygging.
Grundarlag	• **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt** Byggisamtyktin BK17 • **Møgulig fylgiskjøl** FK j. nr. 21/00239-1 Tekniska deild_Uppskot til útstykkingarætlan FK j. nr. 21/00239-21 Matrikultekning dagførd 23082021 FK j. nr. 21/00239-22 Byggifeltir, plantekning dagførd 2308201 FK j. nr. 21/00239-23 Regn- og skittvatnsplanur, dagfördur 23082021 FK j. nr. 21/00239-28 Lokalplanur fyri útstykkingina vesturi á Horn FK j. nr. 21/00239-35 ARKITEK – Skitsa viðv. víddar- og hæddarásetingum og sethúsadømi út frá hesum FK j. nr. 21/00239-36 ARKITEK – Hjáskjal viðv. byggifeltum og hæddarásetingum FK j. nr. 21/00239-37 ARKITEK – Serstøk byggisamtykt fyri sethúsaøkið niðanfyri Innandalsvegin, og íbýðarbyggingina norðanfyri Geilina FK j. nr. 21/00239-39 Nýrúm v/Einar Toftegaard – Visualisering av útstykking vestur Innandals

Viðgerð			
Tekstur íð lýsir loysn	Avleiðingar	Stuttíðar	Langtíðar
	Fíggjarligar	Ja	Ja
	Umsitingarligar	Ja	Ja
Tilmæli	Tekniski leiðarin mælir nevndini til at velja annað av fyriliggjani uppskotum, og at geva teknisku deild heimild til at arbeiða víðari við uppskotinum. **Nýtt tilmæli til fundin 23. august 2021** Tekniski leiðarin mælir til at góðkenna matrikulplanin, at bjóða kloakkarbeiðið frá útstykkingini út beinanvegin, taka undir við		

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

	byggifeltunum og planeringshæddum, og taka undir við lokalplanteksti, soleiðis at serstaka byggismtyktin/lokalplanurin kann fara út til hoyring. **Nýtt tilmæli til fundin 26. august** Tekniski leiðarin og kommunustjórin mæla býráðnum til at taka undir við samtyktini frá teknisku nevnd, dagfest 23. august 2021. **Nýtt tilmæli til fundin í teknisku nevnd 10. februar 2022** Tekniski leiðarin mælir til at góðkenna dagførda uppskotið til serstaka byggisamtykt, góðkenna dagførda matrikulplanin, og leggja serstøku byggisamtyktina út til hoyringar og alment eftirlits, og beina málið í býráðið til víðari avgreiðslu. **Tilmæli til býráðsfund tann 31. mars 2022** Tekniska nevnd beinir uppskotið um útstykkingarplan á økinum millum Gjógvará og vegin vestur á Horn til býráðið til endaliga avgreiðslu. **Tilmæli til fundi í teknisku nevnd 12. Okt. 2026** Tekniski leiðarin mælir til at góðkenna dagførda uppskotið til serstaka byggisamtykt og leggja serstøku byggisamtyktina út til hoyringar og alment eftirlits, og beina málið í býráðið til víðari avgreiðslu.
Dagf	12. apríl 2021. 23. august 2021. 26. august 2021. 17. mars 2022 31. mars 2022

Tekniska nevnd 15. april 2021:
Nevndin tekur undir við fyriliggjandi uppskoti við 10 grundstykkjum. Nevndin mælir eisini til at gera ein lokalplan fyri útstykkingina og gera eina kostnaðarmeting av at byggibúgva grundøkini íroknað planering og tekniska leiðingar. Vegaprosjektið verður ein verkætlan fyri seg.

Býráðið 26. april 2021:
Býráðið tók kunningina frá teknisku nevnd um fyrireiking av útstykkingarætlan vestur í Horn/Innandals til eftirtektar, og ynskti at arbeitt verður víðari við at fáa útstykkingarætlanina framda í verki.

Tekniska nevnd 23. august 2021:
Nevndin samtyti at broyta vegaføringina til eina vegabreitt á 6,0 m og 2,0 m í ovaraborð, og taka burur markalinjuna fyri grundstykkini omanfyri vegin við tí fyri eyga at bjóða økið út til eitt íbúðarprosjekt. Mælt verður til at uppdeilingin á grundøkjunum í niðara borð verður meira

jøvn uppbýtt, og hava nøkunlunda somu stødd. Tikið verður undir við kloakkprosjektinum og at arbeiðið verður bjóða út beinanvegin sum undirhondsboð millum tveir arbeiðstakarar. Tikið verður somuleiðis undir við áleiðis lokalplani fyri økið.

Býráðið 26. august 2021:
Býráðið samtykti einmælt (9-0), at fylgja tilmælinum frá teknisku nevnd og góðkendi matrikulplanin fyri útstykkingina Vestur Innandals umframt ávegis uppskot til broytta byggisamtykt/lokalplan. Harumframt samtykti býráðið, at góðkenna kloakkprosjektið og bjóða arbeiðið út beinanvegin.

Tekniska nevnd 17. marts 2022:
Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið til endaliga avgreiðslu.

Býráðið 31. marts 2022:

Eitt samt býráð samtykti at:
1) góðkenna uppskoti til serstaka byggisamtykt fyri øki vesturi á fløtum (Millum Gjógvará og Vesturi á Horn)
2) góðkenna dagførda matrikulplanin
3) leggja serstøku byggisamtyktina út til hoyringar og alment eftirlit.

Tekniska nevnd 12. oktober 2026:
Tekniska nevnd tekur ein mælt undir við tilmælinum

Býráðið 29. oktober 2026:
Býráðið tekur einmælt undir við tilmælinum frá teknisku nevnd.

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

32/26
26/00086-4 Borgari søkjir um frávik til byggiloyvi.

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Tekniska nevnd	07.09.2026	41/26
2 Býráðið	24.09.2026	22/26
3 Tekniska nevnd	12.10.2026	51/26
4 Býráðið	29.10.2026	32/26

Tilráðing

Til viðgerðar í	Tekniska nevnd
Stutt lýsing av málinum	Eigari av matr. nr. 526 í Fuglafirrði ynskir at víðka um verandi sethús og er kunnaður um, at fleiri brunaviðurskiftir skulu, sambært BK17, gerðast fyri at lúka hesum krøvum. Eigarin ynskir at fáa frávik frá BK17 og brunaviðurskiftinum sum eru galdandi, í samband við útbyggjan av verandi sethúsum.
Orsøk til at málið verður viðgjørt	Øll útsíðan sum eigarin ynskir at søkja um frávik frá, skal verða ein brunaveggur við brunaglasi í vindeygum ið ikki skulu kunna opnast, tí útveggurin er nærri enn 2,5 m frá grannamarki. Grannin hevur bygning standandi á grannamarkinum, sum ikki líkur brunakrøvini í BK17, tí veggurin í mark, ikki er bygdur og ikki klassifiseraður sum brunaveggur, og líkur tí ikki brunakrøvini sum eru sambært BK17. Av tí at grannin eisini hevur ein minni bygging standandi á grannamarki, eru tað krøv til bruna sum tryggjar brúkarin, um eldar skuldi komi í annan av hesum bygginum, og so er ikki brunatryggja frá nakrari síðu. 60 minuttir trygdin sum er við brunaveggi er heilt vekk. Minsta frástøða frá granna er 0,9 m og størsta frástøða er 1,8 m, mált á kortið hjá fuglafordur.kort.fo. Frástøðan til bygging til grannamark er 1,3 m **Viðmæli:** At veggur verður brunaveggur og fráviki kann verða at vindeyguni kunnu verða uttan sama brunaklassa sum útveggurin, tvs vindeyguni hava onga brunaflokk.

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

Grundarlag	• Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt • Fyrispurningur um at sleppa undan brunavindeygum í samband við útbygging – 31. August 2026 • Tekningar við viðmerkingum SOA		
Viðgerð			
Tekstur íð lýsir loysn	Avleiðingar	Stuttíðar	Langtíðar
	Fíggjarligar		
	Umsitingarligar		
Tilmæli	Tekniski leiðarin mælir til at tekniska nevnd tekur støðu til um borgari skal fá frávik til vindeyguni.		
Dagf	04-09-2026		

Tekniska nevnd 07. september 2026:
Tekniska nevnd tekur einmælt undir viðmælinum at geva frávik til vindeyguni, at tey ikki fáa ein brunaflokk.

Býráðið 24. september 2026:
Býráðið mælir til at grannhoyring verður gjørd og at málið verður útsett til komandi býráðsfund.

Tekniska nevnd 12. oktober 2026:
Tekniska nevnd tekur undir við at geva frávik til borgarin

Tekniska nevnd 07. september 2026:
Tekniska nevnd tekur einmælt undir viðmælinum at geva frávik til vindeyguni, at tey ikki fáa ein brunaflokk.

Býráðið 24. september 2026:
Býráðið mælir til at grannhoyring verður gjørd og at málið verður útsett til komandi býráðsfund.

Tekniska nevnd 12. oktober 2026:
Tekniska nevnd tók einmælt undir við tilmælinum frá tekniska leiðaranum.

Býráðið 29. oktober 2026:
Býráðið tekur undir við tilmælinum frá teknisku nevnd við 8 atkvøðum fyri og einari blankari. Ørvar Jacobsen atkvøddi blankt meðan Sonni á Horni, Jastrid á Dalbø, Ólavur Larsen, Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Kristian Martin Petersen, Leif André Eliasen, og Eivin Breiðaskarð atkvøddu fyri.

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

33/26
26/00506-3 Yvirtøka av landsvegnum á Hellunum

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Tekniska nevnd	12.10.2026	54/26
2 Býráðið	29.10.2026	33/26

Tilráðing

Til viðgerðar í	Tekniskunevnd og býráðið
Stutt lýsing av málinum	Í 2014 hava LV og FK gjørt skrivliga yvirtøku av landsvegnum, har treytir vóru í av arbeiðum, ið skuldi gerast áðrenn yvirtøku. Í 2026 hevur LV haft útboð av asfalteringsarbeiðinum og smb útboði gerast í okt. 2026 Samskifti hevur verði millum kommununa og LV um hettar grunda á, at FK ynskir at gera leiðingsarbeiði áðrenn asfaltera verður. Útboð er gjørt av leiðingsarbeiðinum og kann hettar ikki verða liðugt í okt 2026 Grunda á hettar er LV spurt inn til um vit kunnu fáa pengarnar og stýra verkætlanini sjálvir. Myndilin ið hugsaður er, at tann kostnaðarupphædd, sum Landsverk fær asfalteringina fyri, tá útboð v.m. er koyrt, verður flutt til Fuglafjarðar kommunu, móti at kommunan við hesum endaliga yvirtekur kommunala vegin sambært Landsvegaskránni. LV boðar frá, at tað kunnu vit ikki. Teir eru tó sinnaðir at víkja frá tíðarætlanini. Arbeiði skal gerast í 2026 **Fundur var millum partarnar 01.okt 2026 hjá LV.** Vísandi til fundin tann 1. okt. 2026 millum Fuglafjarðar kommunu og Landsverk, um asfaltering av vegnum á Hellunum, kom uppá tal, at kommunan ynskir at yvirtaka vegin heilt til rulluportrið. Landsverk hevur síðani viðgjørt málið og kann ganga umbønini á møti, treytað av at yvirtøkan verður frá og við rulluportrinum v.ø.o. at kommunan eigur og hevur ábyrgdina av rulluportrinum. **Framtíðarstøða og bygging:** Sum nú er landsvegur gjøgnum bygdina og harvið er ein byggilinja áløgd frá LV ið er min 25m frá veg miðju.

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

	Tvs um ein skal byggja má málið bæði fyri hjá FK og hjá LV til góðkenningar. LV víkja sera sjáldan frá teirra kravið, tvs ein møgulig framtíðar ætlan fyri Hellurnar er skjerd, her verður hugsa um frástøðuna um bygging nærri enn 25m. Um vit yvir taka hesa vega longd er nógv størri møguleikar fyri bygging og byggilinja ferð niður á 5m frá vegkanti ella eftir ásettari byggilinju. **Tilmæli** Tekniski leiðarin skýtir upp at leingja vegayvirtøkuna frá uppskotinum í 2014 til at ganga fram til rulluportri. Har við økja vit møguleikarnar at fremja verkætlanir í økinum vit tað at vit áseta komandi byggilinjur.
Orsøk til at málið verður viðgjørt	Skrivlig avtala millum LV og FK í 2014
Grundarlag	• Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt • Avtala 2014 + tekning • Tekning av asfaltering • Útboðstilfar

Viðgerð			
Tekstur íð lýsir loysn	Avleiðingar	Stuttíðar	Langtíðar
	Fíggjarligar		
	Umsitingarligar		
Tilmæli	Tekniski leiðarin mælir teknisku nevnd at viðgera og taka støðu til um Fuglafjarðar kommuna vil yvirtaka landsvegin á Hellunum eftir uppskotinum frá 2014 ella smb. niðurstøðu frá LV. T.v.s. fram til og við rulluportri.		
Dagf	07.10.2026		

Tekniska nevnd 12. oktober 2026:
Tekniska nevnd tekur undir við niðurstøðuni frá fundinum við Landsverk.

Býráðið 29. oktober 2026:
Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum frá teknisku nevnd.

4/26

26/00500-1 Keyp av lendi til byggilendi

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Tekniska nevnd	12.10.2026	44/26
2 Fíggjarnevndin	21.10.2026	42/26
3 Býráðið	29.10.2026	34/26

Tilráðing

Til viðgerðar í	Teknisku- og fíggjarnevnd		
Stutt lýsing av málinum	Keyp av lendi til byggilendi Samskifti hevur við eigaran um keypini og hevur hann játta sølu. Neyðugt er at gera marknaumskipan í samband við keypini. Kostnaðurin fyri hesi stykkir verður: 128a – 648,35m2 * 110 kr = 71.318,50 kr. 128a – 669 m2 * 110 kr = 73.590,00 kr. 777a – 980 m2 * 110 kr = 107.800,00 kr. Tilsamans 252.708,50 kr.		
Orsøk til at málið verður viðgjørt	Keyp av jørð til byggilendi.		
Grundarlag	• Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt • Útskriftir frá kortal 128a og 777a		
Viðgerð			
Tekstur íð lýsir loysn	Avleiðingar	Stuttíðar	Langtíðar
	Fíggjarligar	x	
	Umsitingarligar	x	
Tilmæli	Tekniski leiðarin mælir teknisku nevnd at viðgera og taka støðu til um kommunan skal keypa hesi stykkir til byggilendi		
Dagf	05.10.2026		

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

Tekniska nevnd 12. oktober 2026:
Tekniska nevnd tekur einmælt undir við tilmælinum.

Fíggjarnevndin 21. oktober 2026:
Fíggjarnevndin tekur einmælt undir við tilmælinum og ynskir at notat verður lagt í málið.

Býráðið 29. oktober 2026:
Býráðið tekur einmælt undir við tilmælinum frá teknisku nevnd og fíggjarnevndini.

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

35/26
26/00501-1 Keyp av lendi til byggilendi

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Tekniska nevnd	12.10.2026	45/26
2 Fíggjarnevndin	21.10.2026	43/26
3 Býráðið	29.10.2026	35/26

Tilráðing

Til viðgerðar í	Teknisku- og fíggjarnevnd		
Stutt lýsing av málinum	Keyp av lendi til byggilendi Samskifti hevur við eigaran um keypini og hevur hann játta sølu. Neyðugt er at gera marknaumskipan í samband við keypini. Kostnaðurin fyri stykkið verður: 46a – 322 m2 * 110 kr = 35.420,00 kr.		
Orsøk til at málið verður viðgjørt	Keyp av jørð til byggilendi.		
Grundarlag	• Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt • Útskrift frá kortal 46a		
Viðgerð			
Tekstur íð lýsir loysn	Avleiðingar	Stuttíðar	Langtíðar
	Fíggjarligar	x	
	Umsitingarligar	x	
Tilmæli	Tekniski leiðarin mælir teknisku nevnd at viðgera og taka støðu til um kommunan skal keypa stykkið til byggilendi		
Dagf	05.10.2026		

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

Tekniska nevnd 12. oktober 2026:
Tekniska nevnd tekur ein mælt undir við tilmælinum.

Fíggjarnevndin 21. oktober 2026:
Fíggjarnevndin tekur einmælt undir við tilmælinum og ynskir at notat verður lagt í málið.

Býráðið 29. oktober 2026:
Býráðið tekur einmælt undir við tilmælinum frá teknisku nevnd og fíggjarnevndini.

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

36/26
26/00490-1 Uppskot til eykajáttan - oktober 2026

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	08.10.2026	41/26
2 Býráðið	15.10.2026	26/26
3 Býráðið	29.10.2026	36/26

Tilráðing

Til viðgerðar í	Fíggjarnevndini og býráðnum
Stutt lýsing av málinum	Nú 2/3 av árinum eru farnir vísir tað seg vera tørvur á at fáa eykajáttan til vega til ymisk rakstrarstøð. Talan er um eykajáttan á ialt 2.630,- kr. har 303,- tkr. verða fíggjaðar við flyting frá øðrum raksrarstøðum og resting fíggjað av gjaldførinum.

Flytingar frá:

Rakstrarstað		Upphædd
150	Kommunufeløg	- 15.000
252	Barnaverndarstova	- 18.000
539	Mentanarhúsið rakstur bygningur	- 270.000
Ialt		- **303.000**

Flyting til:

112	Val og valnevndir	55.000
220	Kommunulæknin	115.000
224	Heilsusjúkrasystrar	6.000
540	Mentanarhúsið	270.000
562	Mortanshús	54.000
570	Fótbóltsvøllurin	100.000
572	Svimjihøllin	120.000
614	Matr.347(rakstur FK)	50.000
632	Kommunal útstykking	600.000
636	Kirkjugarðar	200.000
660	Kloakkir	300.000
680	Gøtuljós	200.000
691	Íløga bilar	100.000
710	Ruskøkið	200.000
711	Ruskøkið íløga	260.000

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

	Ialt		2.630.000
	Eykajáttan ialt netto		2.327.000
Orsøk til at málið verður viðgjørt	Sambært kommunustýrislógini og kommunustýrisskipanini skulu tilmæli um eykajáttanir frá fíggjarnevndini góðkennast av býráðnum á tveimum fundum við í minsta lagi 14 daga millumbili.		
Grundarlag	Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt • Komunustýrislógin og kommunustýrisskipanin fyri Fuglafjarðar kommunu. Møgulig fylgiskjøl • Yvirlit yvir eykajáttanarumbønina		
Viðgerð			
Tekstur íð lýsir loysn	Avleiðingar	Stuttíðar	Langtíðar
	Fíggjarligar	j	N
	Umsitingarligar	n	N
Tilmæli	Mælt verður til at fíggjarnevndin tekur støðu til umbønina um eykajáttan oktober 2026 og ger tilmæli til býráðið.		
Dagf	06.10.2026		

Fíggjarnevndin 08. oktober 2026:
Fíggjarnevndin mælir til at boðini um meirnýtslu koma beinanvegin hetta er staðfest, men tekur einmælt undir við eykajáttanini og mælir býráðnum til at góðkenna hesa við 1. viðgerð.

Býráðið 15. oktober 2026:
Býráðið tók einmælt undir við eykajáttanini og beinir hana víðari til 2. viðgerð.

Býráðið 29. oktober 2026:
Býráðið tók einmælt undir við eykajáttanini undir 2. viðgerð.

37/26
26/00337-1 Tilgongd og karmar fyri 2027

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	18.06.2026	32/26
2 Vinnu- og havnanevndin	07.09.2026	20/26
3 Tekniska nevnd	07.09.2026	43/26
4 Orku og umhvørvisnevndin	07.09.2026	13/26
5 Mentamálanevndin		
6 Sosiala nevnd	21.08.2026	18/26
7 Býráðið	25.06.2026	1/26
8 Fíggjarnevndin	16.09.2026	40/26
9 Býráðið	24.09.2026	25/26
10 Fíggjarnevndin	21.10.2026	44/26
11 Býráðið	29.10.2026	37/26
12 Fíggjarnevndin	26.10.2026	45/26

Tilráðing

Til viðgerðar í	Fíggjarnevndin
Stutt lýsing av málinum	Tilgongdin at fáa eina strategiska og skynsama fíggjarætlan 2027 eigur at verða sett á dagskrá skjótast til ber. Viðfest er upprit raðfestingar komandi árini, sum kunnu nýtast sum útgangsstøðið fyri kjakinum og stýring og raðfestingar komandi árini. **Til fíggjarnevndarfund 16.09 2026** Til karmarnar í 2026 skal fíggjarnevndin koma við uppskoti til: • Skattaprosent • Barnafrádrátt • Rakstrar- og Íløgukarm Hetta skal gerast í mun til væntaðu fíggjarstøðuna hjá kommununi fyri 2027. **Til fíggjarnevndarfund 26.10.2026** Aftaná at býráðið 22.-23. oktober hevur arbeitt við raðfestingum á fíggjarætlanini fyri 2027, er samlaði rakstrarkarmurin út við 102 mió. kr. , sum er ein vøkstur uppá 8,6%, meðan løgukarmurin er

	umleið 29 mió. kr. Vøksturin í rakstrinum er serliga á økjunum fyri "børn og ung 8%", "Undirvísing 9%", "teknisk mál 13%" og "kommunal virki 12%".
Orsøk til at málið verður viðgjørt	Sambært kommunustýrislógini og kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu skal fíggjarnevndin fyri 1. oktober leggja uppskot um ársfíggjarætlan fyri býráðið. Tí verður í góðari tíð lagt upp til, at taka støðu til eina tilgongd fyri arbeiðnum og uppskoti til fíggjarkarmar 2027.
Grundarlag	**Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt:** • Kommunustýrislógin • Kommunustýrisskipanin fyri Fuglafjarðar kommunu **Fylgiskjøl :** • Fíggjarætlan TS 1234567 2027 – grundark.xlsx • Fuglafjarðar kommuna fram móti 2030.word • SV_ Lønarhækking 2027

Viðgerð

Tekstur íð lýsir loysn	Avleiðingar	Stuttíðar	Langtíðar
	Fíggjarligar	n	J
	Umsitingarligar	n	?

Tilmæli	Mælt verður til: 1. At fíggjarnevndin setir karmar fyri rakstrinum komandi árið út frá kendum fortreytum, so sum lønar- og prísvøkstri. 2. At fíggjarnevndin leggur eina tíðarætlan fyri arbeiðið við raðfestinum í einstøku nevndunum. 3. At dagar verða settir av í oktober-november at har býráðið saman við fyrisiting viðgerð og snikkar endaligu fíggjarætlanina fyri komandi ár. **Til fíggjarnevndarfundin 16.09.2026** Mælt verður til at fíggjarnevndin umrøður og ger tilmæli um skattaprosent, barnafrádrátt, rakstra- og løgukarm fyri 2027. **Til fíggjarnevndarfundin 26.10.2026** Mælt verður til at fíggjarnevndin tekur støðu til vøksturin í rakstrarkarminum og løgukarmin fyri 2027. **Til býráðsfundin 29.10.2026** Nevndirnar í býráðnum hava síðani summarferiuna arbeitt við raðfestingum av játtanini 2027, eins og býráðið hevur nýtt tveir arbeiðsdagar at snikka endaligt uppskot til. Fíggjarnevndin hevur tikið samanum á fundi 26.10.2026 og mælir til ein samlaðan vøkstur í rakstrinum í 2027 uppá 6%, harav 4%

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

	er settar av til lønarhækkingar. Restin av hækkingini stavar frá prísvøkstri, serliga á orku, viðlíkahald og køkshjálp á dagstovnunum. Samlaða játtanin er 99,5 mió. kr. Raðfestingarnar hjá nevndunum liggja í dag 1,3 mió. kr. omanfyri tær 99,5 mió. kr. og verður tí neyðugt millum 1. og 2. viðgerð, hjá nevndunum at tillaga raksturin. Fíggjarnevndin sendir nevndunum boð um hvat miðast skal eftir at lækka ymisku økini við áðrenn komandi nevndarfundir. Fíggjarnevndin mælir til ein løgukarm uppá 29,5 mió. kr., sum fer til hesar økir: • Kommunal fyrisiting: 1 mió. kr. (dagføring av telduskipanum, innbúgv v.m.) • Almanna- og heilsumál: 0,3 mió. kr. (dagføring av bygningum, v.m.) • Børn og ung: 0,9 mió kr. (dagføring av bygningum, dagføring av list og projektering av nýggjum "Kambi") • Undirvísing: 8,3 mió. kr. (*netto 4,3 mió. kr.* – framhald av renovering av 64-skúlanum) • Mentan og frítíð: 2,9 mió. kr. (sandflogbóltsvøllur, høllin á Kambsdali og ljós til fótbóltsvøllin, v.m.) • Teknisk mál: 19,2 mió. kr. (*netto 17,7 mió. kr.* – útstykking, fríðkan, kirkjugarður, vatnveiting, kloakkir, vegir, gøtuljós og maskinur) • Kommunal virki: 2,3 mió. kr. (moldgoymslan, havnin og vinnuøki á Kambsdali v.m.)
Dagf	16.06.2026

Fíggjarnevndin 18. juni 2026:

Fíggjarnevndin heitir á umsitingina um:

- At umsitingin framskrivar FÆ 2027 við 4% lønarvøkstri og kendum broytingum

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

- At heita á nevndirnar, innan 15. september,um at gjøgnumganga økini í mun til rakstur, harímillum kritisk at taka støðu til lønarkarmin.
- At nevndirnar, innan 15 september, gera yvirlit yvir løguynskir fyri 2027
- At skipa fyri FÆ eksternat 22. og 23 oktober 2027

Orku og umhvørvisnevndin 07. september 2026:
Orku- og umhvørvisnevndin setti arbeiðsdag tann 15.09.26 til at arbeiða við FÆ27 og koma við einum tilmæli til fíggjarætlanina.

Fíggjarnevndin 16. september 2026:
Skattaprosent:
Fíggjarnevndin var ikki á einum málið um skattaprocentið. Ólavur Larsen leggur upp til at skattaprocentið verður skorið við 0,25%. Eyðun á Lakjuni og Dávur Juul halda fast við núverandi skattaprocent.

Barnafrádrátt:
Fíggjarnevndin var á einum málið um at barnafrádrátturin verður tann sami sum í inniverandi árið.

Rakstrarkarmur:
Lønirnar verða framskrivaðar við 4% og at karmurin annars verður tann sami sum inniverandi ár.

Løgukarmur:
Fíggjarnevndin ynskir at fáa ein skjótan fund við fíggjarmálaráðharran áðrenn løgukarmurin kann endaliga ásetast

Býráðið 24. september 2026:
Fyrst varð atkvøtt um minnilutauppskotið frá Ólavur Larsen fíggjarnevndarlimi, um at lækka skattaprosentið 0,25%. Sonni á Horni, Ørvar Jacobsen, Gudny Vang og Ólavur Larsen atkvøddu fyri, meðan Dávur Juul , Eyðun á Lakjuni, Kristian Martin Petersen, Jóan Pauli Olsen og Eivin Breiðaskarð atkvøddu ímóti. Uppskotið fall sostatt.

Síðani varð atkvøtt um uppskotið frá meirilutanum í fíggjarnevndini um skattaprosent, saman við tilmælinum um rakstrar og løgukarmar. Eivin Breiðaskarð, Jóan Pauli Olsen, Eyðun á Lakjuni, Dávur Juul og Gudny Vang atkvøddu fyri, meðan Ólavur Larsen, Ørvar Jacobsen og Sonni á Horni atkvøddu blankt.

Fíggjarnevndin 21. oktober 2026:
Fíggjarnevndin metir, at neyðugt er við varsemi tá fíggjarætlanin verður løgd bæði tí at skuldin nærkast loftinum fyri eina álíkning og tí tørvur kann verða á átrokandi ábøtum komandi árið. Allíkavæl er fíggjarnevndin sinnað at tað verða settar umleið 20 mió. kr. av til nýggjar íløgur í 2027.

Fíggjarnevndin 26. oktober 2026:
Fíggjarnevndin mælir til, at vøksturin í rakstrinum frá 2026 til 2027 heldur seg til 6%, sum svarar til 99,5 mió. kr. og at løgukarmurin í 2027 verður 29,5 mió. kr.

Býráðið 29. oktober 2026:
Býráði tók einmælt undir við tilmælinum frá Fíggjarnevndini og sendir málið víðari til 2. viðgerð.

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

Fundurin lokin kl. 21.30

Dávur Juul

Ólavur Larsen

Eyðun á Lakjuni

Leif André Eliasen

Eivin Breiðaskarð

Sonni á Horni

Jastrid á Dalbø

Ørvar Jacobsen

Kristian Martin Petersen

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Stød 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo